

# Bora nú á umstríddari leið

**Jan Müller**

05.06.2014 - 18:35

Oljan.fo

Statoil hevur nú sett borin í havbotnin á Apollo-leiðini í Barentshavinum, og harvið er tann norðasta leitiboringin nakrantíð byrjað. Tað er pallurin Transocean Spitsbergen (myndin), sum borar.

Umhvørvisverndarfelagsskapurin Greenpeace royndi at forða boringini. Felagsskapurin sendi myndugleikunum kæru, og tað gjørdi, at Statoil noyddist at bíða, til kæran var viðgjørd. Greenpeace valdi eisini at seta fólk upp á Transocean Spitsbergen, men tey tóku seg aftur, tá myndugleikarnir sendu løgregluna eftir teimum.

Seinasta fríggjadagin svaraðu myndugleikarnir kæruni frá Greenpeace, og teirra niðurstøða var, at boringin er ikki í stríð við galdandi reglur um oljuvinnu í Barentshavinum. Síðani fekk Statoil endaligt loyvi at fara undir boringina.

Apollo-brunnurin er knappar 50 kilometrar norðan fyri Wisting Central-fundið á Hoop-leiðini og 175 kilometrar í landssynning úr Bjarnoynni. Havdýpið liggur um 440 metrar.

Feløgini, sum eru við í Apollo-boringini, eru Statoil, ConocoPhilips, OMV og Petoro. Statoil er fyristøðufelag.